LM-070/2023

Fylgiskjal 12.

apoteksverkið

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

17. august 2023

Viðmerkingar til hoyringsskriv og lógaruppskot – mál 21/01157-93 viðv. lógaruppskot til dagførda ílegulóg nevnd: Ílegulógin II

Viðmerking til hoyringsskrivið:

Í skrivinum til hoyringspartarnar er orðing um týdningin um verju av hesum sera viðkvæmu persónupplýsingum sum lógin umfatar:

'Íleguupplýsingar eru sera viðkvæmar upplýsingar, ið kunnu siga nógv um einstaka menniskja og er tað tí av stórum týdningi at verja hesar upplýsingar. Mett verður, at tað er neyðugt, greitt at áseta í løgtingslóg, hvussu hesar upplýsingar og hesin vevnaður verður goymdur, so at hann kann vera goymdur á tryggan og forsvarligan hátt...' (endurgivið)

1) Onki er tó ásett í lógaruppskotinum, sum nevnt omanfyri, at tað er neyðugt greitt at áseta í løgtingslóg, hvussu hesar upplýsingar og hesin vevnaður verður goymdur, so at hann kann vera goymdur á tryggan og forsvarligan hátt. Eitt er, hvussu vevnaðurin verður goymdur, men hetta eigur eisini at umfata viðgerðina sum heild.

Generelt kann sigast um lógaruppskotið, at tað er sera veikt orðað, tá um trygd skrásetta ræður, og tá talan er um trygd yvirhøvur.

Dømini niðanfyri eru úr fylgibrævinum frá HMR til hoyringspartarnar, men neyvari ásetingar eru heldur ikki í lóg ella viðmerkingum.

Ásett verður tó, at Fólkaheilsustýrið kann gera avtalu við granskara um at savna inn og handfara tilfar, um hetta verður gjørt undir *skipaðum og tryggum* viðurskiftum (§3)

- Hvussu verður hetta gjørt í veruleikanum? Hvør kannar eftir ?

apoteksuerkið

Kliniski ábyrgdarhavarin hevur ábyrgdina av granskingarverkætlanini mótvegis einstaklingum og hevur ábyrgdina av at samskifta við granskingarluttakarar um møgulig læknalig ivamál.

- Er mannagongd fyri, hvussu ábyrgdin skal útinnast?

Eisini verður ásett, at vevnaðurin skal sendast aftur til Fólkaheilsustýrið ella burturbeinast eftir nýtslu uttanlands.

- Hvussu verður tryggjað, at vevnaður verður burturbeindur? (talan er her eisini um vevnað, sum er sendur uttanlands).

Viðmerkingar til lógaruppskotið, og til serligu viðmerkingarnar

1. Lógaruppskotið lýsir ongi ítøkilig krøv til trygdarviðurskiftini, havandi í huga, at her er talan um savnan og viðgerð av sera viðkvomum persónsupplýsingum.

2. Í pkt. 1.2.5.5 á síðu 20 verður víst til Kunningar- og trygdarpolitikkin hjá Fólkaheilsustýrinum sum fylgir ISO 27001 og ISO 27002, men her vantar meira ítøkiliga um persóndátuvernd, sum m.a. er umfatað av ISO 27701 standardinum. Har vantar eisini ítøkilig tilvísing til ein persóndátuverndarpolitikk (Privacy Policy) grundað á sera umfatandi viðgerðina av viðkvæmum persónsupplýsingum. Áðrenn farið verður undir Genom verkætlanina eigur eisini at gerast ein Avleiðingargreining smb. Dátuverndarlógina til tess at avmarka váðan fyri tann skrásetta.

3. Í pkt. 1.2.6 verður víst til Dátuverndarlógina og at hon ásetur grundleggjandi reglur sum altíð eiga at verða fylgdar. Her mugu setast ítøkilig krøv til allar dátuábyrgdarar í sambandi við viðgerðina av persónupplýsingunum, t.d. er ikki nøktandi bert at skriva orðingar sum at vevnaður verður latin aftur ella burturbeindur – tryggjast má, at hesi viðurskiftini smb.§ 4 og §§ 10-13 veruliga virka í verki, havandi í huga, at talan er um sera viðkvæmar persónsupplýsingar.

4. Kapitul 2 avleiðingarnar av uppskotinum: Í pkt. 2.16 verður staðfest, at lógaruppskotið ikki hevur aðrar avleiðingar enn pkt. 2.1-2.15 umfata, men her vilja vit gera vart við møguligu avleiðingarnar fyri tann skrásetta í sambandi við goymslu og viðgerð av hesum sera viðkvomu persónupplýsingunum í sambandi við møguliga vantandi persóndátuvernd.

5. Í §§6 og 7 stendur onki um, hvussu persónupplýsingar verða vardar í sambandi við innsavning, og í § 7 stendur, at *viðkomandi* upplýsingar kunnu útvegast. Har er ongin avmarking. Sambært dátuverndarlógini skulu ikki viðgerast fleiri persónsupplýsingar enn neyðugt er, til tess at røkka endamálinum við viðgerðini.

6. Í viðmerkingunum til § 10, 2. stykki stendur (s. 41), at Fólkaheilsustýrið (FHS) ikki gevur atgongd til upplýsingarnar .....uttan at Vísindasiðsemisnevndin hevur góðkent granskingarætlanina....., *og at ásetingarnar í dátuverndarlógini eru yvirhildnar.*

apoteksverkið

7. Hetta seinna stendur tó ikki í lógartekstinum, og heldur Apoteksverkið, at tað er neyðugt, at tilvísing eisini er til dátuverndina í lógartekstinum. Orðingin kann verða, aftaná á orðið "vísindasiðsemilógini" "... og at ásetingarnar í dátuverndarlógini eru hildnar.."

8. Sama orðing er aftur at finna á s. 45, 6. reglubrot, har sagt verður, at: "Tað skal vera møguligt hjá kliniska ábyrgdarhavaranum at útvega sær hetta tilfar, eftir at granskingarverkætlanin er góðkend av vísindasiðsemisnevndini" (endurgivið).

9. Í § 18 "viðkomandi upplýsingar", so sum.....?

- Hvussu er við vernd av persónupplýsingum her? Er tað ein treyt fyri góðkenning frá vísindasiðsemisnevndini, at dátuverndarlógin er hildin? Ella er onnur mannagongd?

10. Heitt verður á HMR um at áseta og/ella vísa á hvussu persónsverndin sum heild er tryggjað í hesum lógaruppskoti.

11. Spurningurin er eisini, hvør ið kannar eftir, at dátuverndarlógin veruliga verður hildin? Er tað FHS, kliniski ábyrgdarhavarin ella onkur annar? Ella er tað bara Dátueftirlitið, sum møguliga ger eftirlit her? Og er tað í so fall nóg mikið? Talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar.

12. Á síðu 52 verður víst til Fylgiskjal 1,2 og 3 – hvat umfata hesi?

Vinarliga

Hjalti Gunnarstein, landsapotekari